# Ákærdur fyri neyðtøku av 14 ára gomlu stjúkdóttur síni

**Í morgun var ein maður í Føroya Rætti ákærdur fyri at hava framt siðamisbrot móti 14 ára gomlu fosturdóttur síni. Í tveimum førum skal hann hava noytt gentuna til samlegu. Ákæran gongur bæði upp á vaginala og anala samlegu, umframt "anden kønslig omgang end samleje"**



**ÁKÆRA**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var klokkan 9.15 í Føroya Rætti í morgun, at ákærurnar vórðu lisnar upp. Tvær ákærur vóru ímóti manninum, sum báðar ganga uppá, at hann hevur framt siðamisbrot móti 14 ára gomlu fosturdóttur sínari heima hjá teimum.

Í fyrra førinum er maðurin ákærdur fyri at hava havt "anden kønslig omgang end samleje" við gentuna – í hesum førinum oralsex –, fyri síðani at hava gjøgnumført vaginala samlegu við hana. Sambært ákæranum var hetta hent einaferð áðrenn juni í fjør, og nýtti maðurin harðskapshóttanir til at ávirka gentuna við.

Í seinna førinum hótti maðurin eisini gentuna við harðskapi. Fyrst hevði maðurin vaginala samlegu við gentuna, og síðani anala samlegu.

**Dómur helst sagdur í dag**
Við atliti fyri bæði ákærda og gentuna, hann hevði gjørt seg inn á, bað ákærin um, at málið varð viðgjørt handan afturlatnar dyr. Hetta er siðvenja í málum sum hesum, og soleiðis varð tað eisini í dag.

Maðurin, sum er 39 ára gamal og úr høvuðsstaðnum, er varðhaldsfongslaður, og í slíkum førum verður dómur ofta sagdur sama dag. Allan fyrrapartin viðgjørdi rætturin málið, og áðrenn evsta mark okkara var dómur ikki feldur.

Rætturin álegði navnaforboð


## ÁRSINS KJAKVIRÐISLØN 2006

Aftur í ár verður ársins kjakvirðisløn latin. Miðlahúsið hevur tikið stig til hesa virðisløn, sum verður latin einum persóni, felag, felagsskapi ella stovni, sum hevur givið sítt góða íkast til at fremja samfelagsliga kjakið, ið er ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum.

Endamálið við at lata hesa virðisløn er eisini at menna og stimbra almenna orðaskiftið og gera tað meira fólksligt, professionelt og náttúrligt. Í fjør fekk Óli Petersen, teknari, virðislønina fyri við sínum tekningum og viðmerkingum at geva sítt góða íkast til samfelagsorðaskiftið.

Lesarar kunnu senda okkum uppskot til ársins kjakvirðisløn við at fylla út lepan og senda hann til Miðlahúsið, Tórsgøta 1, 100 Tórshavn, ella tit brúka teldupostadressu okkara post@sosialurin.fo. Setið frámerki á: »Ársins kjakvirðisløn«.

**Freistin at lata inn uppskot er hósdagin 1. februar.**

Avdúkingin av ársins kjakvirðisløn fyri 2006 verður á samkomu í Miðlahúsinum hósdagin 8. februar kl. 16.00

Ein dómsnevnd við Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmanni, Karin Kjølbro, leiðara á Kriminalforsorgini, Jóannesi Dalsgaard, deildarleiðara í Mentamálaráðnum, og Annleyg Lamhauge, deildarleiðara á Menningastovuni, ger av, hvør fær virðislønina




FØROYA BANKI

miðlahúsið í Vágsbotni




Uppskot:
Grundgeving:

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:

MIÐLAHÚSIÐ · TÓRSGØTA 1 · BOKS 76 · FO-110 TÓRSHAVN · POST@SOSIALURIN.FO